**Nr. 107/2014**

**Janus Rein**
**løgtingsmaður**

**Fyrispurningur eftir Tingskipanini § 52a**

**Fyrispurningur um striking av goldnum avgjaldi á kosmetikvørum o.a., settur Jørgen Niclasen, landsstýrismanni (at svara skrivliga eftir TS § 52a)**

Hevur landsstýrismaðurin ætlanir um at broyta løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um avgjald á framleiðslu og innflutningi (Striking av avgjaldi á kosmetik o.a.), Ll. nr. 43/2015 soleiðis, at handlar, sum hava kosmetikvørur á goymslu pr. 1. juli 2015, eftir umsókn kunnu fáa goldið avgjald afturgoldið, so sølan ikki verður kappingaravlagandi?

**Viðmerkingar:**
Løgtingið samtykti 24. apríl 2015 uppskot frá landsstýrinum um broyting í løgtingslóg um avgjald á framleiðslu og innflutningi (Striking av avgjaldi á kosmetik o.a.) (Løgtingsmál nr. 101/2014). Í viðmerkingunum sigur landsstýrið m.a., at "Handilsvinnan hevur fleiri ferðir víst á, at gjøldini á vørum í kap. 33 virka kappingaravlagandi. Tey flyta søluna frá føroyskum handlum til útlendskar handlar". Hesum tók Fíggjarnevndin eisini undir við og sigur í álitinum m.a. "Nevndin vísir á, at ein avtøka av 20% avgjaldinum fer at flyta ein týðandi part av kosmetikkeypinum til føroyskar handlar". Lógin kemur í gildi 1. juli 2015. (Ll. 43/2015)

Nú er tað soleiðis, at kosmetikkvørur vanliga ikki eru skjótt seljandi vørur, og liggja nógvir av handlunum, sum selja kosmetikvørur, inni við vørugoymslu, har avgjald er goldið, og sum frá 1. juli 2015 verða dýrari at selja enn vørur, sum verða innfluttar eftir 1. juli 2015.

Í 2005 varð broyting gjørd í løgtingslógini um avgjald á framleiðslu og innflutningi, løgtingslóg nr. 43 frá 27. apríl 2005, har broytingar vórðu gjørdar í fleiri vørunummørum, og avgjøldini á vørum, ið eru í Kap. 85 í toll- og vøruskránni, vórðu strikað. Vørurnar vóru millum annað komfýrar, húsarhaldstól, dvd-spælarar, sjónvørp og rakimaskinur. Lógin kom í gildi 1. mai 2005, og í grein 2 í lógini er ásett, at virkir, ið eru skrásetingarskyldug sambært meirvirðisgjaldslógini, kunnu fáa endurgoldið avgjald av vørum í Kap. 85, sum eru á goymslu 30. apríl 2005, t.v.s. vørur, sum eru á goymslu, áðrenn avgjaldið verður strikað eftir lógarbroytingini, sum kom í gildi 1. mai 2005. Eisini er í grein 2 ásettar reglur um, hvussu avgjaldið kann verða afturgoldið.

Reglur um afturgjald av goldnum avgjaldið fyri vørur á goymslu, tá ið lógin um striking av avgjaldinum á kosmetikksvørum kemur í gildi, eru ikki við í løgtingslóg nr. 43/2015.

Hetta hevur við sær, at prísmunur verður á hesum vørum og vørum, innkeyptar eftir 1. juli 2015. Tað merkir, at tað almenna við hesum ger kappingaravlagandi missmun á fyritøkum og handlum við tað, at teir handlar, sum hava stórt lagur og nógvar vørur at vísa fram til fólk, verða fyri missmuni í mun til fyritøkur og handlar, sum ikki hava

stórvegis lagur. Samanutikið eiga øll at verða sett líka fyri lógini. Tí verður hesin fyrispurningur settur, har landsstýrismaðurin verður spurdur, um hann hevur ætlanir um at gera broyting í lógini og áseta reglur um afturgjald av goldnum avgjøldum, soleiðis sum varð gjørt í lóg nr. 43 frá 27. apríl 2005.

**Á Løgtingi, 23. juni 2015**

Janus Rein